# VEÐRIÐ Í HVANNASUNDI



# JUNI 2024

# VEÐURSTOVA FØROYA

**Dagfesting**: 6. juni 2024

**Staður**: Sundsvegur 70 – 740 Hvannasund

**Heimildarfólk:** Tóri Simonsen, skipari

**Viðtal við**: Hanus Kjølbro

# Hvannasund

Hvannasund er bygd sunnalaga á vestursíðuni á Viðoy. Eystan fyri bygdina er høg og brøtt fjallarøð, og vestanfyri er sundið, sum hevur sama navn sum bygdin. Í støðum er sundið smalt, og fjøllini hinumegin sundið – á Borðoy – eru eisini høg og brøtt.




Mynd 1: Kort av Viðoy. Hvannasund er mitt í kringinum.

## Veðrið í bygdini

Veðrið í Hvannasundi er tengt at ættini, sum tað er í øllum støðum í Føroyum.

Kemur hann norðan- ella sunnaneftir og strekkir sundið, er einki sum stendur fyri. Fjallarøðin á Viðoy eystanfyri verja bygdina, tá ið vindurin er lítil, men ger hann ójavnan, tá ið nakað av vindi er. Tað sama er, tá ið hann liggur vestaneftir og skal upp um fjøllini á Borðoynni.

Fyri at fáa greiði á hvussu veðrið er á teimum ymsu ættunum í Hvannasundi, setti undirritaði seg í samband við Tóra Simonsen, sum er ættaður úr Hvannasundi og hevur búð har meginpartin av lívinum. Hann hevur verið skipari á fiskiskipum, síðan hann var ungur. Eisini hevur hann fingist nógv við útróður og fuglaveiði.

Við til samrøðuna, sum var í heiminum hjá Tóra Simonsen í Hvannasundi, hevði eg spurnarblað – til allar 16 ættirnar, ið vanliga eru umtalaðar í bygdini:

- Er vindurin javnur ella ójavnur á ættini
- Er meira vindur í ættini enn aðrasteðs – ella øvugt
- Er ættin vát – t.e. regn, tá ið turt er aðrastaðni – ella øvugt
- Er hetta mjørkaætt?
- Er ættin vanliga ein góð ætt ella ein ring ætt – ber til at siga tað við fáum orðum?
- Onnur viðurskifti um ættina, søgur, fyribrigdi, hendingar o.s.fr.

Spurt varð somu spurningarnar ætt fyri ætt. Byrjað varð við norðan, og var farið allan kringin runt eystureftir, og steðgað var við heil- og hálv- og millumættirnar.




*Mynd 2: Tær 32 ættirnar. Til samrøðuna eru ikki allar 32 ættirnar brúktar, men onnurhvør - t.e. heil-, hálv- og millumættirnar.*

## Norðan

Norðan liggur javnur suður ígjøgnum sundið, og kennist sum ein øgiligur gjøgnumtrekkur í bygdini.




Norðan merkist tó ikki líka í allari bygdini. Suðuri á Sýn – t.e. sunnan fyri Oyruna – er hon ikki so keðilig sum har norðuri í bygdini. Í nógvum vindi av norði verður sagt, at hjá teimum, sum eru til gongu, snýr tað seg um at koma heim um (*suður um*) gamla skúla, so er sloppið, tað ringasta er av.

Vindurin er javnur, og vindferðin er tann sama ella meir enn hon er kring landið.

Høgættirnar millum útnyrðing og eysturhallan norðan eru vátar við ælingur ella meiri enn tað.

Norðan er hvørki brim- ella mjørkaætt í Hvannasundi.

Sum hinar høgættirnar, er norðan ikki ein góð ætt í Hvannasundi. Veðrið er ófýsi. Vindurin er javnur, so ættin er ikki skaðaætt – góðillveðursætt.

## Landnyrðingur norðan

Landnyrðingur norðan líkist norðan og fer suður ígjøgnum sundið, men er ójavnur í illveðri.

## Landnyrðingur

Landnyrðingur liggur øvugtur niðan í bygdina. Hann kemur um Sundsskarð og slær ímóti Borðoynni, hinumegin sundið og liggur niðan í bygdina í Sandoyrabug og úti í Bug. Ættin er køld, og í teim gomlu húsunum kom hann upp ígjøgnum gólvini.




Vindurin er ójavnur, og vindferðin er heldur minni enn hon er kring landið. Eitt sindur av orkuni er farin úr ættini, tá ið hon fyrst er farin yvir sum Sundið og so er komin aftur. Í góðveðri eru vindgarðar á sundinum suðureftir.

Landnyrðingur er ein vát ætt, tað regnar næstan altíð. Eisini er vanliga tjúkt í veðrinum, sjáldan klárt.

Landnyrðingur er hvørki brim- ella brimætt í Hvannasundi.

## Landnyrðingur eystan

Landnyrðingur eystan ein góð ætt, men eitt sindur ójavnur, líkasum landnyrðingur. Men á sundinum er stillari.

## Eystan

Eystan er besta ættin í Hvannasundi til vind. Í góðveðri er stilli og turt. Í Tronganum millum Oyruna og Fossánes er eisini stilli í illveðri, men nógvur vindur og hvirlur báðumegin við – t.e. sunnan fyri Oyruna og norðan fyri Fossánes.




Lítla lotið sæst ikki á sundinum, men sunnan fyri Oyruna gular hann heimeftir (*norðureftir*).

Tað allarbesta veðrið er, tá ið hann er beint oman fyri eystan – eitt strik, sum tey kalla tað. Hetta er køstagarðættin í Hvannasundi, saman við vesturættini. Tað er stilli, hóast nógvur vindur er aðrastaðni. Ein kona sigst einaferð hava spurt ein útróðrarmann, hví hann ikki var farin til útróðrar í hesum góða veðrinum. Hann svaraði, at tað var ikki útróðrarveður, hóast stilli var í sundinum. So helt konan fyri, at so kundu teir tað sama draga bátin niðan undir Gerðhamar – hann er í umleið 400 m hædd!

Er ættin beint undir eystan, lotar hann norðureftir og er altíð javnur.

Í illveðri er vátt, tá ið hann liggur eystaneftir, og tá ið tað kemur til kava, legst mesti kavin niður á hesari ættini.

Tað er mjørki um summrið, men sjáldan millum hús. Hann er á sundinum og kemur heim til oljubryggjuna. Einki brim er á eysturætt.

## Landsynningur eystan

Veðrið á landsynningi eystri líkist veðrinum av landsynningi, men kanska heldur minni vindur. Gular javnur norðureftir.

## Landsynningur

Landsynningur strekkir sundið norðureftir. Í bygdini leggja tey lítið til merkis til hann, har norðuri í bygdini als einki. Heldur ikki í nógvum vindi. Hann heldur seg á sundinum.




Vindurin er javnur, ongantíð hvirlur, og vindferðin tann sama sum fyri landið.

Tað er ofta avfall saman við landsynningi – næstan altíð vátt.

Um summarið kann vera mjørki, men sjáldan millum hús. Mjørkin er úti á sundinum.

Á landsynningi er brim í Depli, men ikki í Hvannasundi. Hetta er ættin við mesta av aldu – vindvág.

Yvirhøvur er ættin ikki roknað sum ring, men vát, og tey ræðast ikki hana.

## Landsynningur sunnan

Veðrið á landsynningi suðuri líkist veðrinum av landsynningi, men í illveðri kann vindurin vera ójavnur.

## Sunnan

Sunnan er ringasta ætt í Hvannasundi – ringasta skaðaættin.

Hann rekur upp á Toftaknúki, kemur ímóti bygdini og rekur upp á Ennið. Ringasta veðrið er, tá ið hann er beint vestan fyri sunnan – eitt strik, sum tey siga.




Vindurin er sera ójavnur, og vindferðin er í minsta lagi tvær ferðir vindferðina kring landið – bæði í góðum og ringum veðri. Regnar illa í illveðri, eru hvirlurnar ikki líka harðligar, sum tá ið tað er turt. Tá eru hvirlurnar ógvuliga harðligar.

Sagt verður um vind av suðuri í Hvannasundi, at hann sum ikki hevur ligið veðurfastur har á suðurætt, kann ikki snakka um nógvan vind!

Tað er eitt sindur ymiskt, hvussu tað er við avfalli, tá ið hann er sunnan. Tað kann regna illa, men í góðveðri regnar sjáldan. Tá ið brúgvaløg leggja leiðina framvið, slítur í, tá ið hann støkkur vesturum, og sólin sæst stava.

Tað er hvørki mjørki ella brim í Hvannasundi á suðurættini.

## Útsynningur sunnan

Útsynningur sunnan er ikki líka ring sum sunnan. Tað kunnu vera hvirlur á ættin, men tað er longur millum tær. Annars líkist hon sunnan. Góð góðveðursætt.

## Útsynningur

Útsynningur er ein góð ætt í Hvannasundi. Hann rekur upp av Nóngjógv (*í Húsadali*) og kemur um Hóvabakka (*sunnan fyri Norðdepil*) til heimara part av bygdini.

Er illveður lágt, er sloppið, tá ið hann gongur upp og er komin upp í útsynning.




Vindurin er javnur, og vindferðin er minni enn fyri landið.

Vanliga er turt, tá ið hann liggur av útsynningi. Útsynningur er besta terraættin í Hvannasundi. Regnar á útsynningi, er tjúkt brúgvalag omanfyri.

Útsynningur hevur hvørki mjørka ella brim við sær í Hvannasundi.

## Útsynningur vestan

Útsynningur vestan liggur beint tvørtur um sundi frá Depli yvir í Sýn. Ættin er góð, tað er turt og klárt, líka sum á útsynningi. Felags fyri útsynning vestan og vestan er, at tær er skaðaættir í ódnarveðri. Annars besta ætt til vind og turt. Mestsum stilli, heilt upp til storm.

Eitt valkvøld eftir kríggið doyði 3 mans doyðu í vanlukku, tá ið ættin var beint undir vestan og vestfall – t.e. tað rak norðureftir. Brádliga kom ein hvirla og holvdi bátin. Ein maður slapp ikki við bátinum, tí mamman vildi ikki – hon kendi ættina, hvussu lumpin hon kundi verða.

## Vestan

Vestan rekur upp fyri Lokkan og er ein teimum heilt góðu ættunum í Hvannasundi.




Tað er stilt í góðum veðri og turt og klárt eisini, men hon er skaðaætt í ringum veðri.

Vindurin er lítil og javnur upp til ódnarveður. Men so kastar hann allar vegir og kann vera skaðaætt.

Tað er hvørki mjørki ella brim á vesturættini.

## Útnyrðingur vestan

Tá ið ættin er útnyrðingur vestan, lotar suður ígjøgnum sundið. Ættin er góð, so leingi tað ikki er illveður.

Í illveðri, tá ið ættin gongur upp úr vestri, glaðar suður eftir sundinum, og tær fyrstu glaðurnar, sum koma, kunnu vera ógvusligar. Vindurin kemur oman av fjallarøðini suðureftir, og so liggur hann rangur í bygdini – t.e. kemur omaneftir í millum húsinin í bygdini.

## Útnyrðingur

Útnyrðingur er ikki ein góð ætt í Hvannasundi. Hann strekkir sundið suðureftir og liggur javnur, og tað kennist sum ein øgiligur gjøgnumtrekkur.




Er illveður kring landið, og lágtrýstið fer norðurvið vestan fyri Føroyar, er vindurin sera ójavnur, til hann er komin úr vestri upp í útnyrðing. Vindferðin er ikki minni, enn hon er kring landið, heldur eitt sindur meir.

Høgættirnar er yvirhøvur ikki góðar í Hvannasundi og hava altíð ælaveður við sær, og soleiðis er eisini við útnyrðingi. Í ringum veðri er so at siga altíð avfall.

## Útnyrðingur norðan

Útnyrðingur norðan líkist útnyrðingi. Veðrið av útnyrðingi upp í norðan líkist nógv.